# Rækjuskipaflotin skilir ikki landsstýrið

**- Landsstýrið eigur beinanvegin at geva rækjuskipunum loyvi at fiska á Grand Bank, sigur reiðaríið hjá rækjutrolaranum, Høgafossi**

GRAND BANK
*Vilmund Jacobsen*

Bæði umborð á rækjutrolaranum, Høgafossi og hjá reiðarínum, sum eigur skipið, eru teir stak misnøgdir við, at landsstýrið nú í meira enn eitt ár hevur noktað føroyskum rækjuskipum at sleppa inn á Grand Bank at fiska.

- Hetta hendir, samstundis sum skip úr øðrum NAFO-londum hava fiskað har alla tíðina, sigur reiðaríið, sum ikki heldur, at nøkur rímilig orsøk er til, at hetta mál hevur drigið so nógv út.

Reiðaríið hjá Høgafossi sigur, at fiskileiðirnar í altjóða sjógvi á Grand Bank, sum liggur innanfyri Flemmish Kap, høvdu verið kærkomnar, nú tað hevur viðrað so serstakliga illa á Flemmish Kap í vetur.

Víst verður eisini á truplu støðuna, sum føroyski rækjuskipaflotin er í.

- Vit hava fleiri ferðir vent okkum til landsstýrið fyri at fáa loyvi at fiska á Grand Bank seinasta túr, men vit noyðast at ásanna, at einki spurdist burtur úr hesum, sigur reiðaríið.

### Rækjuskipini missa í báðum endum

Reiðaríið sigur, at rækjuskipini upprunaliga vóru sinnað at liva við, at Kanada stongdi sínar havnir fyri føroyskum skipum. Í staðin vildu skipini fáa atgongd til tey søguligu veiðirættindini, sum føroyski rækjuflotin hevur vunnið sær á Grand Bank.

- Men tá ið so landsstýrið í februar 2002 stongdi leiðirnar á Grand Bank fyri sínum egnu skipum, samstundis sum skipini heldur ikki sleppa inn í Kanada, rinda vit ein prís fyri nøkur rættindi, sum vit ikki sleppa at gagnnýta. Hetta er ein ótolandi støða hjá rækjuskipaflotanum.

Reiðaríið sigur, at tað er bert Kanada, sum vinnur nakað uppá hetta, og í hesum førinum eru kanadiumenn væl hjálptir av landsstýrinum.

- Vit krevja tí, at landsstýrið beinanvegin gevur føroysku rækjuskipunum loyvi at fara á rækjuveiði aftur á Grand Bank, sigur reiðaríið hjá Høgafossi, sum er sera misnøgt við landsstýrið í hesum máli.



*- Tá ið landsstýrið í februar 2002 stongdi leiðirnar á Grand Bank fyri sínum egnu skipum, samstundis sum skipini heldur ikki sleppa inn í Kanada, rinda vit ein prís fyri nøkur rættindi, sum vit ikki sleppa at gagnnýta. Hetta er ein ótolandi støða hjá rækjuskipaflotanum, sigur reiðaríið hjá Høgafossi*

# Høgifossur siglir heim við fullari last

**Umborð á Høgafossi hava teir ikki upplivað ein verri vetur á Flemmish Kap enn seinasta vetur.**
**- Tá ið tíðindi herfyri bórust um, at tríggir íslendskir rækjutrolarar høvdu fingið sjógv, var Høgifossur eisini staddur har, sigur reiðaríið**

RÆKJUR
*Vilmund Jacobsen*

Sandavágstrolarin Høgifossur, sum hevur verið á rækjuveiði á Flemmish Kap, fór seint sunnukvøldið at sigla heim við fullari last, sløkum 600 tonsum av rækjum. Væntandi verða teir í Føroyum komandi vikuskiftið.

Reiðaríið hevur bjóðað rækjurnar út, bæði í Føroyum, Danmark, Íslandi og Noregi, og støða verður í næstum tikin til, hvar selt verður - og um landað verður í Føroyum ella í Danmark.



*Áðrenn Høgifossur fór at sigla heim, gjørdist ein av manningini, sum telur 18, brádliga sjúkur. Maðurin varð fluttur til lands við kanadiskari bjargingartyrlu og hevur tað gott nú*

### Ringur vetur

Høgifossur var fyrsti føroyski rækjutrolarin, sum legði leiðina á Flemmish Kap í ár, meðan flest allir hinir rækjutrolararnir fóru til Eysturgrønlands í byrjanini av árinum.

Reiðaríið sigur, at fiskiskapurin fyrru helvt av túrinum var sera nógv darvaður av ringum veðri.

Umborð á Høgafossi hava teir nevniliga ikki upplivað ein verri vetur á Flemmish Kap enn seinasta vetur.

- Tá ið tíðindi herfyri bórust um, at tríggir íslendskir rækjutrolarar høvdu fingið sjógv, var Høgifossur eisini staddur har. Sandavágstrolarin er tó so mikið stórur í mun til teir tríggjar íslendsku trolararnar, og tí hendi onki við Høgafossi, sigur reiðaríið.

Høgifossur byrjaði túrin 18. januar, og henda seinasta mánaðin hevur fiskiskapurin verið góður.

Í løtuni eru Hvilvtenni, Sólborg og South Island á Flemmish Kap.

### Maður sjúkur

Reiðaríið veit at siga, at áðrenn farið varð at sigla heim, gjørdist ein av manningini, sum telur 18, brádliga sjúkur. Maðurin varð fluttur til lands við kanadiskari bjargingartyrlu, sum um somu tíð var hjá einum sponskum trolara eftir einum sjúkum manni.

- Maðurin á Høgafossi fekk viðgerð á sjúkrahúsi í St. John´s í Ný

Foundlandi, hagar hann kom á sjúkrahús bert 6 tímar eftir, at skiparin sendi boð eftir tyrluni.

Reiðaríið sigur, at maðurin hevur tað gott nú.

### Fer yviraftur

Høgifossur fer nýggjan túr, so skjótt teir eru lidnir at landa.

Skipið fer yvir aftur á Flemmish Kap, men reiðaríið væntar eisini, at fiskiloyvið til Grand Bank verður útskrivað.

- Nú er ikki forsvarligt at bíða longur við hesum, sigur reiðaríið hjá Høgafossi.

